tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Óneyðugur mystikkur

## *Oddagrein*

Tá hetta landsstýrið varð skipað, boðaði Anfinn Kalsberg, løgmaður, frá, at landsstýrið skuldi hava gott samband við føroyska almenningin. Gjøgnum fjølmiðlarnar, sjálvandi. Hann boðaði frá opinleika. Ørvísi kundi tað ikki skiljast.

Í hesum døgum verður framtíðarstøða Føroya viðgjørd. Í landsstýri. Í uttanlandsnevnd Løgtingsins. Í fjølmiðlunum. Og manna millum. Í undirhúsum. Í egningarskúrum. Á fiskavirkjum. Og við døgurðaborðið.

Men Føroya fólk skal bara ikki hava at vita, hvat Føroya Landsstýri skal samráðast við donsku stjórnina um. Hóast varaløgmaður í yvirskriftum hevur tosað um »greiðar linjur« og "»demokratiskar mannagongdir« frá fyrsta deg í Tinganesi.

Øll skilja væl, at landsstýrið ikki fer at almannakunngera tann taktikk, sum landsstýrið ætlar at brúka í samráðingunum við donsku stjórnina. Hinvegin átti landsstýrið at kunngjørt uppritið - grundarlagið - fyri samráðingunum.

Tað er sagt fleiri ferðir, at einki nýtt er í uppritinum. Uppritið byggir á løgtingssamtyktina og tað, sum kom fram í Hvítubók. V.ø.o. skuldi hetta verið nóg góð grund til at almannakunngera uppritið.

Vit minnast tá Hvítabók skuldi kunngerast. Boðað varð frá langt frammanundan, at bókin skuldi leggjast fram á almennari samkomu á Parnassinum. Bólkar løgdu fram síni arbeiði og seancan við amboðskassa og stórum smíli varð send beinleiðis.

Men nú er vent í holuni, og júst hetta, at uppritið er stemplað »í trúnaði«, ger ætlan landsstýrisins óneyðuga mystiska. Hvat liggur nú aftanfyri? Hvat ætlar landsstýrið, sum ikki má koma út?

Talan er jú ikki um marknasamráðingar við eitt fremman land sum t. d. Bretland! Í slíkum samráðingum má einki leka út. Tað sigur seg sjálvt, men nú er ikki talan um eitt fremmant land, og málið er um framtíðarlagnuna hjá hvørjum einasta føroyingi.

Tað skerst ikki burt, at landsstýrið hevur ikki havt tað hepnastu hondina at handfara hetta málið í seinastuni. Ikki fyrr enn í vikuni kom undan kavi, at uttanlandsnevndin viðger eitt upprit, men at landsstýrið hevur harafturat gjørt eitt uppskot til sáttmála, sum landsstýrið skal leggja fyri stjórnina í samráðingunum. Neyvan gagnar hesin duldi leikur ætlan landsstýrisins um fullveldi, og gott tað sama, halda óivað mangir føroyingar, tá ætlanin skal haldast loynilig og fara fram í duldum.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Følsk rættleiðing í Dimmalætting

Í Dimmalætting hósdagin verður á síðu 7 prentað viðmerking frá Rógva Thomsen við yvirskriftini »Rætting og treytaleys umbering til Hergeir Nielsen«.

Greinin er ein sera álvarssom ákæra móti Sosialinum, har tað m. a. verður sagt, citat:

> »Tað, sum Sosialurin vísti móti Hergeiri Nielsen var skaðafrøði og skaðavirksemi av ringasta slag og verður harðliga átalað, avvíst og samstundis verður ein treytaleys umbering veitt Hergeiri Nielsen fyri mín leiklut, ið var ein samrøða við Sosialin, sum eg á ongan hátt kann kennast við hvørki í innihaldi, uppseting ella prenti.«


Rætting og treytaleys umbering til Hergeir Nielsen

MEINING
Rógvi Thomsen

Fyri at skaða annars frálíka samskiftið millum løgtingsumboð Tjóðveldisfloksins og Suðuroyar Oljuvinnuráð skrivaði Sosialurin í farnu viku yvir alla forstíðuna, at: »Hergeir sveik Suðuroynna«, og bleiv eg sera skakkur av, at tað var eg, sum bar hesi tíðindi.

Aftan á hesa sera niðrandi forsíðu skrivar blaðið síðani á ...

... verður somuleiðis, at eg havi úttalað meg sum næstformann fyri Suðuroyar Oljuvinnuráð. Eg segði Sosialinum, at samgongan eftir mínum tykki hevði svikið útjaðaran.

Samrøðan við Sosialin verður gjørd politisk og kemur út í røttu løtu við hesum spotti av løgtingsmanninum millum aðru og triðju viðgerð av kolvetnismálinum, og hoyrdu vit m.a. ein floksformann undir triðju viðgerð standa og flagga við sam-...

... tingsmannin fyri Tjóðveldisflokkin sum ein sera sakligan mann, ið vil Suðuroynni og oljufelagnum alt tað besta í ídnavirksemi sínum fyri áhugamálum okkara, har vit ongantíð hava kent hann sum ein svík, men tvørturímóti hevur hann arbeitt av øllum alvi fyri at leggja eina útgerðarhavn í Suðuroy. Tað eigur Hergeir Nielsen mín fulla stuðul og takk fyri í hesum máli.

Tað harmar meg ótrúligt, at ...

... kundi roknast við somu ni... støðu í einum tingmáli, sum ... ið málið var til viðgerðar í la... stýrinum, sigur mær, at ta... størri áhugi í einum fyr... bíligum politiskum løtuv... ingi, hvat eg ikki vóni tað bl... framyvir.

Tað er sera óheppið og ... óskiljandi, at seta suðring... teir sum enn hava vilja og ... at stríðast fyri okkara felags... – upp móti hvørjum øð... Hetta skaðar mítt trúvirði ...

*Greinin, sum stóð á síðu 7 í Dimmalætting í gjár, varð skrivað upp á nakkan á Rógva Thomsen*

Undirritaði skal gera vart við, at umrødda bræv varð eisini sent Sosialinum. Men tá eingin undirskrift fylgdi við, eiheldur bústaður hjá innsendaranum, gjørdu vit - sum vit eisini meta okkum eiga - av at ringja til Rógva Thomsen, sum lá á sjúkrahúsi á Tvøroyri.

Frá honum fingu vit at vita, at hann hevði ikki skrivað hetta brævið. Hann segði seg heldur ikki kennast við innihaldið í tí. Hann bað okkum um ikki at seta brævið í blaðið, og hesum eftirlíkaðu vit honum sjálvandi í.

Eisini segði hann, at hann fór at ringja til Dimmalætting fyri at tryggja sær, at brævið ikki fór í tað blaðið heldur.

Upplýsast kann, at bjálvin, brævið er sent í, er stemplaður í Havn, helst mánadagin 7. februar.

Blaðið metir hetta málið so mikið álvarsligt, at seinasta orð er ikki sagt frá okkara síðu.



*Brævbjálvin varð stempladur í Havn mánadagin. Helst er tað falsarin, ið eigur áskriftina á brævbjálvanum*

**Jan Müller,**
**ábyrgdarblaðstjóri**

# Ingi Olsen á ting

*Kendi hondbóltsleikarin úr Vestmanna, Ingi Olsen, tók á tingfundinum týdagin á fyrsta sinni sæti á tingi*

John Johannessen

Tá Fólkaflokstingmaðurin, Jákup Suni Joensen, á tingfundinum týsdagin bað um farloyvi frá tingarbeiðinum, merkti hetta, at kendi hondbóltsleikarin úr Vestmanna, Ingi Olsen, fyri fyrstu ferð skuldi taka sæti á tingi.

Jákup Suni Joensen bað í skrivi dagfest 5. februar 2000 tingið um at fáa farloyvi úr tingarbeiðinum frá 8. februar, og at næsti maður á lista Fólkafloksins í Norðurstreymoyar valdømi skuldi taka við sessinum á tingi, meðan hann var burtur.

Næsti maðurin á lista Fólkafloksins í Norðurstreymoyar valdømi var Ingi Olsen, og var tað sostætt hesin, ið tók sæti á tingi fyri Jákup Suna Joensen.

Ingi Olsen fekk til valið í 1998 114 persónligar atkvøður. Jákup Suni Joensen fekk 144 atkvøður. Tann, ið fekk triðj mestar atkvøður á lista Fólkafloksins í Norðurstreymoy var Niels Thomas Pedersen, og fekk hesin 71 atkvøður.

Umframt hondbóltin, starvast Ingi Olsen vanliga sum deildarleiðari fyri deildirnar hjá Føroya Banka í Vestmanna og í Vágum. Ingi Olsen hevur tvær ferðir stillað um til løgtingsval, báðar ferðir á lista Fólkafloksins.


*Ingi Olsen var næstur á listanum hjá Fólkaflokkinum í Norðstreymi við 114 persónligum atkvøðum*



# »American Empress« kemur tann 22. februar

*Stóri trolarin »American Empress« verður gjørdur klárur í løtuni og miðað verður móti at hann verður í Føroyum tann 22. februar. Manningin telur 75 kvinnur og menn, har tey 15 eru m. a. norðmenn, japanar og amerikumenn*

ÓLAVUR Í BEITI


*Í løtuni eru fleiri av føroysku manningini yvir í Noregi og rigga American Empress til, og verður alt klárt til tíðina, verður »American Empress« í Føroyum tann 22. februar*

Áhugin fyri tíðarvendu ætlanunum hjá JFK Trol og Norway Seafood at fiska svartkjaft at virka til surimi við stóra Røkke-trolaranum »American Empress« er rættiliga stórur, ikki bert her á landi, men eisini yviri í Noregi. Sum skilst er talan um eina sera áhugaverda verkætlan, sum kann leggja lunnar undir einum nýggjum og sunnum svartkjaftaævintýri, um alt gongst eftir ætlanunum hjá JFK Trol.

Í løtuni eru fleiri av føroysku manningini yvir í Noregi og rigga stóra trolaran til, og verður alt klárt til tíðina, verður »American Empress« í Føroyum tann 22. februar, og so ganga tvey døgn at trolarin verður klárur at fara til fiskiskap eftir svartkjafti at virka til surimi.

**60 føroyingar við**

75 kvinnur og menn verða við »American Empress«, har 60 av manningini eru føroyingar. 15 útlendingar m.a. bæði úr Noregi, Japan og Amerika verða eisini við trolaranum, men hetta verður helst bert at byrja við sum ein partur av verkætlanini.

Í stuttari viðmerking við Sosialin, sigur Hanus Hansen, stjóri í JFK Trol, sum er á veg yvir til Noregs, at alt gongst eftir ætlan í løtuni, og kemur einki í vegin, verður trolarin í Føroyum til ásettu tíð.

# Íslendsk málningaframsýning

Leygardagin 12. feb. kl. 16.00 letur upp málningaframsýning hjá Victor Cilia, úr Íslandi. Victor er føddur í Reykjavík. Mamma hansara er íslendsk, og pápi hansara er av Malta.

Victor Cilia er føddur í 1960 og fekk útbúgving sína á Myndalista- og handíðskóla Íslands 1978-81 og 1990-92. Hann hevur arbeitt nógv síðani 1978 á sjónleikarahúsi, við film og í sjónvarpi. Tey síðstu árini hevur hann tó fyri tað mesta arbeitt við lýsingum og uppseting, umframt at hava arbeitt eitt sindur við søguligum framsýningum ymsastaðini í Íslandi.

Victor Cilia hevur fleiri framsýningar bæði einsamallur og saman við øðrum.

**Framsýningar saman við øðrum:**
Art Festival í Reykjavík 1992
Listasavnið í Laugardalur, Reykjavík 1992
Á Kjarvalstøðum 1995
Á Keltilhúsinum í Akureyri 1996
Í Mokka, Reykjavík 1997
Á Galerie in Airport Hotel, Hamburg, Týsklani
Á Gallery Sævars Karls, Reykjavík 1999

**Framsýningar einsamallur:**
Museum og Modern Art, Reykjavík, 1993
Götugrillið, Reykjavík, 1993
Gallery Greip, Reykjavík, 1994
Á Gallery Sævars Karls, Reykjavík 1995
Gallery Greip, Reykjavík, 1996
Gallery Sýnibox, Reykjavík, 1996
Hafnarborg, Hafnarfjørður, 1998

Málningarnir hjá Victor eru við atliti til listasøguna, sum byggir á eina gamla mynsturtraditión, og hevur mynstur leingi verið nýtt at tulka náttúruna, Keltararnir tulkaðu tað guddommiliga við sínari skreytlist sigur Auður Ólafsdóttir, íslendskt listasøgufólk í eini grein um listina hjá Victor Cilia. Hesi semitrisku systemini í málningunum hjá honum eru symbolið upp á veruleikan í síni heild. „Líka sum líkamikið í listini frá endurburðartíðini – ella príðingararbeiðið í barokktíðini. Men hóast málningarnir hjá Victor Cilia hava støði langt aftur í listasøguna, hava hesir eisini nógv, sum vísir til nútíðar eyðkenni“. Soleiðis broytast keltiski „meginsniglilin“ og „solarsymbolið“ ella flættingamynstrið í víkingatíðini seg lættliga til parabolar, horn, lampur og til nógv



onnur teknisk móttøkutól.

Sjálvur sigur Victor, at hann sær tekniska útstýrið í heiminum sum eina víðari uppfatan av náttúruni – eitt slag av menniskjligari, skaptari náttúru. „Málningarnir eru útførdir sum mystur, sum seinni verða til organiskar formar. Formarnir kunnu líka so væl verða livandi skapningar ella slags mekanisma. Tankarnir fáa vit frá menniskjalikaminum, t.d. oyrunum, og kunna tey sppfata og taka ímóti ljóði.

Á framsýningini, verða 16 oljumálningar.

Victor Cilia kom til Føroyar í gjár og býr í Norðurlandahúsinum.

Tit eru vælkomin at seta tykkum í samband við Norðurlandahúsið og spyrja eftir Victor, um tit hava áhuga í hesum.

**Vinarligar heilsanir**
**Noðurlandahúsið í Føroyum**

